# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lagalig løta í torførum umstøðum

Í farnu viku lækkaði europeiski miðbankin enn eina ferð rentuna. Donsku bankarnir vóru skjótir aftaná. Føroyska rentan fer helst at kvinka sama veg, men hon er framvegis væl hægri enn rentan á meginlandinum, og tað verður mett lítið sannlíkt, at hon fer at lækka niður á tað støðið, sum europeiska rentan er á. Føroysku peningastovnarnir siga, at rentumunurin er ov lítil. Um ætlanin er at økja um munin, so fer innlánsrentan at lækka meiri enn útlánsrentan.

Pensum plagdi at vera, at tá ið rentan lækkaði, so minkaði áhugin fyri at spara upp, og at áhugin fyri at læna til nýtslu og at gera íløgur øktist, og tað átti so aftur at borið við sær, at eftirspurningurin eftir arbeiðskraft øktist, og at arbeiðsloysið harvið minkaði.

Higartil hava rentulækkingarnar ikki víst seg at havt hesa ávirkan. Eftirspurningurin er framvegis minkandi, og álitið á skipanina er burtur. Tað vísir seg vera meiri enn torført at endurskapa álitið, og tað ber við sær minni samfelagskøku, inntøkugrundarlagið hjá tí almenna minkar – minni løn at skatta av og minni MVG og avgjaldsinntøkur - og harvið verður vælferðarsamfelagið sett undir trýst.

Gongdin minnir um hana í sjeyti árunum, tá ið tað eisini lak ímillum teori og praksis. Tað varð sagt, at um prísvøksturin var stórur, so minkaði arbeiðsloysið. Hetta var satt, inntil oljukreppuna, tá ið prísvøksturin og arbeiðsloysið fóru at ganga hond í hond. Tað tók meiri enn tíggju ár at vinna á oljukreppuni, sum herjaðu øll sjeyti árini.

Í Føroyum kunnu vit fegnast um lækkandi oljuprísirnar. Vit kunnu eisini staðfesta, at tað innan fiskivinnuna vendir øðrvísi, enn tað plagar: upsafiskiskapurin er góður, og upsaprísirnir eru høgir. Lítið er til av toski, og toskaprísurin er í botni. Tað sigast vónir vera um, at toskaprísurin fer at fara upp nú uppundir páskir. Tað hevði komið væl við.

Í búskapi og fiskiskapi eru føroyingar ikki kendir fyri at halda seg á miðjuni. Antin er tað heilt gott, ella er tað heilt í hinum borðinum. Tað plagar ikki at vera nakar millumvegur, tí bogin verður høgt spentur. Um tað skuldi borið til at fingið onkrar bygnaðarligar tillagingar í núverandi støðu, so kundi tað verið, at lækkandi rentan ger, at nú er lagaliga løtan at fáa rentustuðulin lækkaðan, uttan at tað hevði órógvað so nógv, og tað kundi verið, at veiðutrýstið í toskafiskarínum varð skert, nú alt ov mongu línuskipini hava meiri enn ilt við at fáa tað at hanga saman.

Royndirnar siga, at politiski myndugleikin hevur ilt við at taks seg saman at gera nakað sum helst við fiskivinnuna. Tað kann hugsast, at illa sperdu peningastovnarnir nú fáa møguleika at taka sær av tí uppgávuni – á sama hátt sum teir fyri fáum árum síðani tóku avbjóðingina at tillaga alivinnuna á seg - og at politiski myndugleikin tók seg saman at niðurlaga rentustuðulin. Um hetta hevði eydnast, so høvdu átøk, sum heilt víst høvdu komið samfelagnum til góða, verið tikin, meðan tað brýtur í bæði borð. Tað hevði klætt peningastovnunum og myndugleikanum.

**Sosialurin**

## Útvarps – sjónvarps – fjølmiðlamál



**JOHN BERG**
Hvalba

Hoyrdi í morgun, at sterkt øl skuldi bryggjast á Velbastað – helst rætta staðið. Útvarpskonan segði, at málið hevði fingið bein at ganga á. Í mínari verð merkir hetta, at okkurt, ið smakkar væl, verður skjótt uppi, tá ið tað fær bein at ganga á. Haldi eisini, at hetta var sama røddin, ið fyri nakað síðani í tíðindasending tosaði um eitt mál, har onkur skuldi **lofta dýpið.**

Í 3-2 í SVF verða fleiri fótbóltsleikarar í útlendskum kappingum lagdir undir **ikki at vera heilt skarpir**, tá ið teir við sínum skotum ikki hava fingið bóltin í netið.

Gott, at Jógvan í Lon við sínum málhugleiðingum er komin í útvarpið – hann skuldi fingið nógv meiri senditíð.

Eyðun á Borg hevði okkurt um orðið at skreiða og **at sleta** í eini Dimmu herfyri. Haldi, at at sleta er at rokna sum barnamál, men tó frálíkt orð, sum kann góðtakast. Hann spurdi, um onkur brúkti orðið at hilla. Haldi ikki, nakar ger tað nú á døgum, men tá ið eg var óviti í Hvalba hillaðu vit á hillufjalum. Hetta vóru sletur, sum vóru gjørdar av 3-5 tunnustavum festir saman við okum. Samanber sangin hjá Johs. Andr. Næs – hvalbingur – *So hilla vit og skreiða, kjúlala hey fitt flyksingur fúkandi fleyg*!

Spell at morgunlesturin ikki verður endursendur.

Tað má tó sigast at vera mikil nýhugsan, at óvitar nú hava møguleika at síggja teknifilm klokkan hálvgum sjey um morgunin.

## Brennivín drepur líka nógv sum royking



**JOHN SIGURD JOENSEN**

Líka nógv fólk doyggja av brennivíni, øli og víni, sum av royking, staðfesta granskarar í USA.

Granskarar í USA staðfesta, at brennivín og annað flótandi sum svirrar er líka skaðiligt sum royking. Teir siga, at 1 út av 10 sum byrja at drekka, blíva alkoholikarar, hetta er galdandi bæði fyri menn og kvinnur. Bert í Onglandi doyggja 4.000 fólk av brennivíni um dagin, siga teir, og so gloyma politikarnir, hvussu nógvan annan skaða rúsdrekka ger, samanborið við royking.

Drekkurin ein í familjuni, rakar tað seks til átta onnur avvarðandi. Familjan syndrast, harðskapaur, sum kann enda við drápi, sjálvmorð í hópatali, hjúnarskilnaður í hóatali og eru so smábørn í familjuni, ávirkar hetta tey restina av lívinum, at hoyra foreldrini skeldast og enda verri berjast og sláa hvønn annan, og tann likamligi skaðin, livurin verður skadd, búkspítskertilin verður skaddur, vandi er fyri blóðtøppi og ikki minst, at heilin tekur skaða av rúsdrekka.

Svenskarar skiga um alkoholikarar, at "de drikker anderledes". Hetta er so satt sum tað er sagt, alkoholikarin fær eitt stoff í heilan, sum ger, at hann altíð má hava okkurt at drekka (brennivín). Tað verður sagt, einferð alkoholikari, altíð alkoholikari.

Granskararnir í USA meta, at um prísurin av brennivíni, øli og víni og tað flótandi sum svirrar varð settur 10% upp, vildi hetta ført við sær, at deyðsføllini hjá monnum høvdu fallið við 29%, og hjá kvinnum við 37% pr ár, og er hetta tal ikki so lítið.

At enda heita granskararnir á politikararnir um at gera nakað við hetta vandamál. Ongantíð ov skjótt.

Hetta havi eg funnið inni á internetinum (google) og eri púra samdur við hesum granskarum.

## Runavíkarvegurin og Rituvíkarvegurin



**MAGNUS RASMUSSEN**
borgarstjóri,
Runavíkar kommuna

Í tíðindasendingini í Kringvarpinum á middegi fríggjadagin 6. mars bórust tíðindini um, at peningur til fleiri íløgur í vegir, tunlar og havnir á løgtingsfíggjarlógini var fluttur til onnur øki. Íløgurnar til Runavíkarvegin og Rituvíkarvegin vóru nevndar sum dømi um íløgur, sum skuldu strikast.

Í Degi og viku sama kvøldið var tosað við John Johannessen, tingmann Javnaðarfloksins og Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformann og tingmann Fólkafloksins um ætlanina at flyta íløgurnar til vegir, tunlar og havnir til onnur øki. John Johannessen segði, at semja var um hesa ætlanina, meðan Anfinn Kalsberg segði, at semja hvørki var at taka peningin av og enn minni at brúka peningin til nakað annað enn tað, teir eru ætlaðir til.

Hvørjum skal man trúgva?

Fyri okkum í Runavíkar kommunu er tað av stórum týdningi at byrjað verður upp á bæði Runavíkarvegin og Rituvíkarvegin. Hetta eru ætlanir, sum hava ligið á láni í nógv ár og eru neyðugar at fáa byrjan á beinanvegin.

So áheitan mín er á løgtingslimir um at standa við tað, sum tit hava samtykt fyri kortum, soleiðis, at ætlaninar við Runavíkarvegnum og Rituvíkarvegnum verður sett í verk í ár.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.